# Reglugerð fyri nýtslu av bátaplássum í Tvøroyrar kommunu

Henda reglugerð hevur heimild í kommunufulltrúini og er galdandi fyri allar bátaeigarar, sum hava fingið nýtslurætt til bátapláss í Tvøroyrar kommunu. Bátaplássini eru ætlað smábátum og bátum innan ferðavinnuna, har eigarin býr ella er skrásettur í Tvøroyrar kommunu. Onnur kunnu fáa bátapláss, um kommunan metir, at tey økja um virksemi og trivnaðin í kommununi.

**Kapittul 1**
**Umsiting av bátaplássum**

**§ 1.** Tað er Tvøroyrar Havn, sum umsitur bátaplássini í samráði við umsitingina hjá Tvøroyrar kommunu.

**Kapittul 2**

**Umsókn í sambandi við leigu av bátaplássið**

**§ 2.** Umsókn um bátapláss (teym) skal latast inn skrivliga til Tvøroyrar Havn. Oyðublað er gjørt til endamáli og finst á heimasíðuni hjá Tvøroyrar kommunu á www.tvk.fo undir bjálkanum teknikkur og umhvørvi.

*Stk. 2.* Umsøkjarar, ið eru búsitandi í Tvøroyrar kommunu, hava framíhjárætt til eitt bátapláss á Tvøroyri.

*Stk. 3.* Umsøkjari, sum ikki er búsitandi í Tvøroyrar kommunu, fær bjóða bátapláss, um bátapláss er tøkt og eingin bíðilisti er.

*Stk. 4.* Kommunan tilskilar sær rætt til við 6 mánaða varningi, at uppsiga sáttmálan um bátapláss við bátaeigara, sum ikki er búsitandi í Tvøroyrar kommunu, um so er, at ein borgari í Tvøroyrar kommunu søkir um bátapláss.

*Stk. 5.* Er bíðilisti til eitt bátapláss verður farið fram eftir grundregluni um "først til mølle" – tað vil siga tann umsøkjari, sum stendur fremst á bíðilistanum, fær bjóða bátapláss. Fyrilit skulu takast, hvat fyri bátapláss talan er um við atliti til longd, breidd, tyngd og stungu á báti.

*Stk. 6.* Umsøkjarin fær skrivligt svar, har viðkomandi fær bjóða bátapláss frá kommununi, og umsøkjarin hevur freist í 2 vikur, at svara skrivliga, um viðkomandi tekur av bátaplássinum ella ikki.

*Stk. 7.* Hevur Tvøroyrar kommuna ikki fingið skrivligt svar frá umsøkjaranum innan 2 vikur, so verður bátaplássið bjóða næsta umsøkjara á bíðilistanum.

*St. 8.* Tekur umsøkjari av tilboðnum um bátapláss verður avtala gjørd við Tvøroyrar Havn, nær bátaplássið kann yvirtakast og oyðublaðið, sum nevnt er undir § 2, stk. 1, verður undirskrivað.

*Stk. 9.* Tekur umsøkjari ikki av tilboðunum, verður bátaplássið bjóða næsta umsøkjara á bíðilistanum.

## Kapittul 3

## Ábyrgdin hjá bátaeigarum (leigarum)

**§ 3.** Bátaeigarin (hereftir leigarin) hevur skyldu til at fara væl um bátaplássið, økið á landi og flótibrýrnar.

*Stk. 2.* Leigarin tekur við bátaplássinum í tí standi, tað er, tá leigarin fær plássið tillutað. Um bummur/teymur ella annað er brotið ella skatt, skal bátaeigarin gera vart við hetta beinanvegin. Ger bátaeigarin ikki tað, at boða frá møguligum skaðum, verður bátaeigarin mettur at hava ábyrgdina av skaðanum.

*Stk. 3.* Bátaeigarin hevur ábyrgdina av bátaplássinum, og skal endurgjalda skaðar, ið koma á útbúnaðin t.d. bummar, festir og aðrar bátar uttan so, at hesir skaðar koma av illveðri, vanligum sliti ella elli, sum Tvøroyrar kommuna og ikki bátaeigarin hevur ábyrgdina av.

*Stk. 4.* Tað er ikki loyvt, at hava amboð, fiskireiðskap ella annað tilfar liggjandi á landi við bátaplássið ella á flótibrúgvunum. Allir slíkir lutir ella reiðskapur verður burturbeindur uttan ávaring og fyri eigarans rokning og ábyrgd.

*Stk. 5.* Tað er strangliga bannað, at kasta garnar, høvd ella annað á sjógv inni í bátahylinum.

*Stk. 6.* Bátaeigarin hevur ábyrgdina av, at báturin er í forsvarligum standi. Bátaeigarin skal syrgja fyri, at halda bátin lens, og at festa bátin soleiðis, at endarnir liggja væl og ikki slítast óneyðugt, og at báturin ikki er til ampa fyri onnur ella kemur at skaða aðrar bátar ella ognir í Tvøroyrar Havn.

*Stk. 7.* Tá siglt verður inni í havnini skal hetta verða gjørt við størsta varsemi og við so lítlari ferð sum møguligt í mesta lagi 2-3 míl.

*Stk. 8.* Bátaeigarin hevur skyldu, at fylgja boðum frá havnamyndugleikanum í Tvøroyrar Havn.

## Kapittul 4

## Gjald fyri leigu av bátaplássinum

**§ 4.** Leiga verður goldin samsvarandi teimum til eina og hvørja tíð galdandi leigugjøldum fyri bátapláss í Tvøroyrar kommunu. Leigan er eitt ársgjald og er nú kr:

| | | <u>Vegleiðandi breidd:</u> |
|---|---|---|
| Fýramannafar og minni | 550 kr um árið. | 160-199cm |
| Seksmannafar | 900 kr um árið. | 200-229cm |
| Áttamannafar | 1320 kr um árið | 230-259cm |

| | | |
|---|---|---|
| Tíggjumannafar | 1480kr um árið | 260-289cm |
| Seksæringur og størri | 1800 kr um árið | 290cm og breiðari |

*Stk. 2.* Leigan fyri árið skal vera goldin í seinasta lagi ultimo januar.

*Stk. 3.* Um leigan ikki er goldin 14 dagar aftan á falldag, sendir kommunan bátaeigaranum innskrivað bræv við áheitan um, at gjalda leiguna innan 10. gerandisdagar. Er leigan tá ikki goldin, sendir kommunan bátaeigaranum innskrivað bræv við kunning um, at leigumálið er tikið aftur. Í sama brævi fær bátaeigarin boð um, at báturin skal flytast av bátaplássinum innan 14. dagar. Um bátaeigarin ikki fylgir boðunum frá kommununi hesum viðvíkjandi, so flytir Tvøroyrar kommuna bátin til hóskandi stað hjá kommununi fyri eigarans ábyrgd og rokning.

*Stk. 4.* Óansæð nær í árinum leigumálið tekur við ella heldur uppat, verður upphæddin altíð fult ársgjald.

## Kapittul 5

## Nýtsla av bátaplássinum

**§ 5.** Um bátaeigarin selur sín bát, skal hann beinanvegin boða Tvøroyrar Havn frá hesum. Bátaplássið fylgir ikki við bátinum uttan so, at nýggi eigarin ger sáttmála við Tvøroyrar Havn eftir galdandi treytum, ið eru ásettar í hesi reglugerð.

*Stk. 2.* Um bátaeigarin selur sín bát til annan borgara, sum býr í kommununi, kann keyparin yvirtaka bátaplássi. Henda yvirtøka tó bert við góðkenning frá Tvøroyrar Havn.

*Stk. 3.* Um bátaeigarin selur sín bát til borgara, sum ikki býr í Tvøroyrar kommunu, og ynskir keypari, at yvirtaka bátaplássið, so má keyparin fyrst søkja um bátapláss. Er bíðilisti eftir bátaplássi, so hava borgarar búsitandi í Tvøroyrar kommunu framíhjárætt til eitt bátapláss samsvarandi § 2, stk. 2 í hesari reglugerð.

*Stk. 4.* Hevur bátaeigarin ikki fingið sær annan góðkendan bát áðrenn 6. mánaðir frá søludegnum at rokna, er nýtslurætturin til bátaplássið fallin burtur. Kommunan kann tá lata øðrum bátaeigara bátaplássið.

*Stk. 5.* Um bátaeigari í meira enn 6. mánaðir ikki hevur brúkt bátaplássið til egnan bát, tá hevur kommunan rætt til at uppsiga leigumálið við 3. mánaða freist og í hesum sambandi lata øðrum umsøkjara bátaplássið.

*Stk. 6.* Bátaeigari, sum ætlar at keypa størri ella minni bát, skal skrivliga søkja Tvøroyrar kommunu um eitt størri ella minni bátapláss í hesum sambandi. Umsókn um broyting av bátaplássið verður tillutað eftir aldrinum á umsóknini.

*Stk. 7.* Um bátaeigarin ikki fer at nýta bátaplássið í 30 samanhangandi dagar ella meira, hevur bátaeigarin skyldu til beinanvegin at boða Tvøroyrar Havn frá hesum.

*Stk. 8.* Um viðurskiftini eru sum nevnd í § 5, stk. 7, so hevur Tvøroyrar kommuna rætt til at lata onnur nýta bátaplássið, uttan at bátaeigarin fær leiguna endurgoldna fyri tað tíðarskeiðið.

*Stk. 9.* Um Tvøroyrar kommuna skal brúka økið, har bátaplássið er staðsett, til okkurt annað endamál, ella tað er neyðugt, at flyta bátaplássini av øðrum orsøkum, so hevur kommunan rætt til at taka bátaplássi aftur við 3. mánaða varningi.

*Stk. 10.* Flytir bátaeigarin úr Tvøroyrar kommunu, verður bátaplássið tikið aftur. Bátaeigarin kann tó í hesum førinum søkja um bátapláss undir øðrum treytum.

*Stk. 11.* Tá ið bátaplássið er latið- ella tikið aftur, hevur bátaeigarin skyldu til at flyta bátin beinanvegin. Verður hetta ikki gjørt, verður báturin fluttur til hóskandi stað hjá kommununi fyri eigarans ábyrgd og rokning samsvarandi § 4, stk. 3 í hesari reglugerð.

## Kapittul 6

## Brot á hesa reglugerð

**§ 6.** Hóast Tvøroyrar kommuna hevur 3. mánaða uppsagnartíð í mun til leigarar, sum hava bátapláss, so kann kommunan - aftaná skrivliga ávaring – taka bátaplássið aftur, um so er, at henda reglugerð verður brotin. Brot á hesa reglugerð kann fevna um, men er ikki avmarkað til, tey í stk. 2-4 nevndu viðurskifti.

*Stk. 2.* Um leiga fyri bátaplássið ikki er goldin samsvarandi § 4 í hesari reglugerð.

*Stk. 3.* Um leigarin ikki aktar boðum frá Tvøroyrar Havn.

*Stk. 4.* Um leigarin fremur onnur brot á reglugerðina, og ikki beinanvegin heldur uppat við tí, hóast leigarin hevur fingið skrivliga ávaring hesum viðvíkjandi.

## Kapittul 7

## Dagføring av reglugerðini

**§ 7.** Tvøroyrar kommuna kann dagføra hesa reglugerð í samráði við havnarmeistaran, men skal í hvørjum einstøkum føri kunnað Tvøroyrar býráð hesum viðvíkjandi.

## Kapittul 8

## Samtykt og góðkend reglugerð

**§ 8.** Tvøroyrar býráð hevur á fundi tann 11. desember 2017 samtykt, at góðkenna hesa reglugerð.

## Kapittul 9

## Gildiskoma

**§ 9.** Reglugerðin kemur í gildi tann 1. mars 2018.

Tvøroyri, 6. februar 2018

Kristin Michelsen
Borgarstjóri

Henrik Weihe Joensen
Kommunustjóri

Dagføring 14. mars 2024

Kap. 4, §4 -Gjøld fyri leigu av bátaplássum (Teymagjøld í báthyljum hjá Tvøroyrar kommunu)

Gjald kr/ pr. ár:

| | |
|---|---|
| Stig 1 (160> 199cm): | 1000 kr |
| Stig 2 (200>229 cm): | 1500 kr |
| Stig 3 (230>259 cm): | 2000 kr |
| Stig 4 (260>289 cm): | 2500 kr |
| Stig 5 (290 cm >): | 3000 kr |

Bátar á landi: ókeypis 18 dagar, hareftir 30 kr um dagin. Skal báturin liggja fast er tað sum minsta gjald í hylinum stig 1.

Kristin Michelsen, borgarstjóri

Fróði Mortensen, kommunustjóri